TING-HELLAN

# Aftur at samrá



*Gomlu oddvitarnir í fullveldislandsstýrinum, Anfinn Kallsberg og Høgni Hoydal, skulu nú aftur umboða Føroyar á Christiansborg. Helena Dam á Neystabø var triðja føroyska umboðið í fullveldissamráðingunum. Eisini hjá henni gekk væl á fólkatingsvalinum týsdagin, men tað rakk ikki til umboðan á Christiansborg*

???
*Kári á Rógvi*
*karir@hi.is*



Bert fáar dagar eftir, at tað frættist, at heimasíðan fullveldi.fo fór í søguna, vórðu framherjarnir báðir í fullveldislandsstýrinum, Anfinn og Høgni, valdir á fólkating

Tað er við sterkari manning, at føroyingar møta á fólkatingi í næstum. Anfinn Kalsberg og Høgni Hoydal eru millum royndastu tingmenn í Føroyum og hava nú høvi at ávirka ta fatan, donsk tingfólk hava av støðu Føroya.

Hetta er nakað sum at síggja 2'aran í filsmrøðini hjá Ullu Boje. Færøerne.dk var filmurin, sum gav dønum fatan av, at føroyingar livdu av at ganga á bingo at vinna sær seyð, um ikki vóru so hepnir at finna sjóriknan hval í fjørðuni. Føroyingum gav filmurin ta fatan, at okkara menn vóru heldur illa fyrireikaðir til realpolitikkin á Christiansborg.

Góðtrúnir og glaðbeintir fóru teir Anfinn og Høgni fyri fimm árum síðani at samráðast við danir um sáttmála millum "de høje kontraherende parter." Ætlanin var tá, at Føroyar ríkisrættarliga skuldu fara út at skifta meining. Fyrst skuldu vit taka fullveldi í stutta stund og síðani aftur um stutta stund binda okkum í felagskap við "ríkja" heldur enn "ríkis" í navninum.

Stevið er helst ikki heilt í takt hesuferð. Anfinn og Høgni gjørdust mestsum óvinir til endans í tíðarbili fulldissamgongunnar. Sigst at teir bert samskiftu við gulum seðlum. Høgni koppaði Jørgen, Anfinn tók Annlis afturfyri, og soleiðis numust teir heldur ófryntliga.

Men, sum bretar siga, vika er long tíð í politikki. Áðrenn fyrsta súlukortið er fult, munnu Anfinn og Høgni vera vornir væl aftur uppiyvir eini bjór í Kastrup. Anfinn er Føroya sterkasti realpolitikari, og Høgni má vera pedagogiskt flogvit at hava fingið so toluligt skikk uppá bargadafólkið í tjóðveldisflokkinum. So tað skuldi borið til at lagt ráð saman um tilgongdina á danatingi.

## Valið av

Føroyingar eru sær sjálvum líkir. Teir megna altíð at hava mótsettar meiningar í senn. Tá fullveldismenn sótu við róðrið, valdu teir Lisbeth og Høgna; nú javnaðarflokkurin ræður í sambandssinnaðari samgongu, velja teir Anfinn og Høgna. Í teirri drúgvu føroysku sjálvstýristilgongdini vil føroyski veljarin altíð sleppa at javnviga áhaldni og íhaldni.

Føroyski veljarin er sera besnissaður og sjálvmedvitin. Vit sóu longu á kommunu- og løgtingsvalunum seinast, at veljarin vil hava politikarar at røkja álitisstørv síni væl og virðiliga og ikki vera uppií ov nógvum í senn. Heðin Mortensen, Jógvan Arge og Katrin Dahl Jacobsen vórðu vrakaði á løgtingsvalinum, men stjórna nú býráðnum í høvuðsstaði og størstu kommu landsins.

Á sama hátt valdi føroyski veljarin at biða landsstýrismenn sita í Tinganesi í frið. Tann sama Helena Dam á Neystabø, sum ikki var vald á løgting, fekk framúrskarandi úrslit fyri uttantingsmann og liggur væl fyri at gerast fólkatingsumboð næstu ferð, serliga um Jóannes Eidesgaard enn er løgmaður.

Sambandsflokkurin var fyri øgiligum bakkasti. Men tað var væntandi. Tá fullveldismenn ráddu, vildu mangir borgarligir veljarar vísa, at teir vildu hava sjálvstýristilgongd, men ikki loysing yvir háls og herðar. Nú er fullveldi ikki longur at finna í samgonguskjalinum, og hesir somu veljarar vilja vísa, at fyri tað skal sjálvstýristilgondin ikki steðga.

Lisbeth L. Petersen hevði tó eisini sín stóra leiklut. Fyrst tapti hon løgtingsvalið uppá loynilig vallyftum, og nú var hon við at tryggja tapið við loyniligum úrslitum. Hon greiðir heldur kryptiskt frá, at danskir ráðharrar mangan hava verið hollir, og at hon hevur atkvøtt ímóti Venstre fleiri ferðir. Men júst í hvørjum málum, Venstre og Anders Fogh hava flutt seg fyri hennara skyld, er enn dult. Sambandshugsjónin skuldi annars ikki verið so ring at selt; samveldi við víðfevndum sjálvstýri er upplagt fyri lítið land sum okkara. Trupulleikin er, at jú sjálvbjargnari og meiri sjálvstýrandi Føroyar eru vornar, jú verri er tað bert at røða um, at ríkissfelagskapurin er fortreytin fyri øllum. Evangeliið má stiðast við epistlum.

Veljarakanningar hava helst gjørt sítt. Tað ringasta fyri ein flokk er at liggja á odda í seinastu veljarakanningini. Miðlarnir skrivaðu, at javnaðurin fór at vinna, og sambandið tapa. Í veruleikanum vísti kanningin, at tríggir teir fremstu flokkarnir vóru so javnir, at teir lógu innan fyri óvissuna í slíkari kanning, og kanningin hevði, so løgið tað ljóðar, ikki tikið við, hvussu nógv enn vóru í iva. Kanningin hevur eyðvitað verið við til at flutt nakrar sambands-, javnaðar- og smáflokkaatkvøður, serliga til fólkaflokkin.

Ómetaliga góða úrslitið hjá Anfinni er í familju við úrslitini hjá Poul Schlüter og Poul Nyrup til ES-valið. Landsins fráfarni stjórnarleiðari fær eina tøkk frá veljarunum fyri tænastu sína og fær mandat til umboða landið sum statsmaður í samveldistinginum. Føroyski veljarin hevur við hesum eisini vrakað ta yvirdrivnu politisku korrektheit, ið førdi til fallið hjá Anfinni av løgmansbríkini. Eisini Edmun Joensen fekk stuðul sum statsmaður, umenn hansara herðaklapp var nakað leysari í tí.

## Norðuratlantsmenn

Men aftur til teir báðar, ið skjótt aftur skulu ganga upp gróttrappurnar á gomlu kongsborgini. Høgni fer uttan iva aftur í norðuratlantsbólkin, har Kuupik Kleist og Lars Emil Johansen somuleiðis eru afturvaldir. Bólkurin hevur havt støðu sum tingflokkur og hevur tí havt góðar arbeiðsumstøður við skrivstovu og starvsfólki. Hans Jacob Helms, ið fyrr hevur verið ovasti umsitingarleiðari í Grønlandi, hevur stjórnað arbeiðnum á Christiansborg, og Sjúrður Skaale hevur verið "tann sum arbeiddi" við føroysku málunum.

Júst Sjúrður hevði helst verið forðingin fyri at fingið Anfinn uppí bólkin. Sjúrður er nakað snarsyntur til at vera í politikki. Hevur alment sagt ymiskt minni enn smikrandi um Anfinn - og sínar egnu. Men nú gevst hann í